gult6 cyan6 magenta6 svart6

Tórbjørn tveitti leiðsluna út

Leiðslan fyri Vestmanna skúla staðfestir í fundarfrágreiðing frá fundi við Tórbjørn Jacobsen, at hann bað annan av varaskúlastjórunum sleppa sær á dyr, og at hann bað leiðsluna fara til Kollafjarðar at stilla seg á barrikadurnar saman við Hans Paula Strøm. Vit prenta her fundarfrágreiðingina hjá vestmenningum í fullari longd

Vestmanna, t. 28. mai 2001
frá fundi í Mentamálastýrinum 25. mai 2001 millum Mentamálastýrið og leiðsluna við Vestmanna Skúla

Kristi Himmalsferðardag 24. mai 2001 beint eftir døgurða ringdi Janus Jensen frá Fólkaskúladeildini til skúlaleiðaran Jóannes Fonsdal við boðum um, at mentamálaharrin var ørkymlaður av tíðindum, sum fjølmiðlar (Útvarp Føroya, Sosialurin og Dimmalætting) høvdu borið frá Vestmanna Skúla. Og mentamálaráðharrin beyð leiðsluni við Vestmanna Skúla at koma til fundar í Mentamálastýrinum fríggjadagin 25. mai kl. 11.00.

Á tíðindafundi mikudagin 23. mai hevði Vestmanna Skúli lagt fram fyri fjølmiðlum, hvørja støðu skúlin verður í komandi skúlaár, vegna vantandi játtan til fólkaskúlan og tí býtislykli, sum tímarnar til allar skúlarnar verða býttir eftir.

Á hesum tíðindafundi varð víst á, hvussu meint hetta rakar Vestmanna Skúla og aðrar líknandi skúlar.

Kl. 10.50 fríggjamorgunin møtti leiðsla skúlans á MMS. Leiðslan hevði tikið álitisfólkið við, sum siðvenja er.

Kl. 11.10 varð fundurin settur, hóast landsstýrismaðurin ikki var møttur.

Umboðandi MMS vóru Hensar Ellingsgaard, deildarstjóri, Janus Jensen, undirvísingarleiðari og Poul Nolsøe, løgfrøðingur. Umboðandi Vestmanna Skúla vóru Jóannes Fonsdal, skúlastjóri, Augusta E. Petersen og Kirsten Simonsen, varaskúlastjórar og Gyðja H. Didriksen, álitisfólk.

Hensar Ellingsgaard bjóðaði vælkomin. Umboð fyri MMS førdu fram, at Vestmanna Skúli hevði ikki borið seg rætt at í málinum við at tosa við fjølmiðlarnar, meðan arbeitt var við málinum í MMS. Vestmanna Skúli bar nakað av síni áskoðan fram og greiddi frá, hví tey ikki mettu at MMS arbeiddi við málinum. Poul Nolsøe førdi fram, at tey har í húsinum føldu seg stungnan í baki av Vestmanna Skúla og metti at skúlaleiðarin var illloyalur við at fara út til fjølmiðlarnar, hóast at Poul Nolsøe ikki hevði hoyrt tíðindasendingina í Útvarpinum. Hann metti, at skúlaleiðarin ongan rætt hevði at úttala seg. At Lærarafelagið kundi gera tað, tað kundi hann acceptera, men eftir hvat skiltist á Poul Nolsøe hava skúlaleiðarar ongan rætt at úttala seg, tí tað verður sæð sum illloyalitetur og provokatión móti mentamálastýrinum. Tosað varð aftur og fram um viðurskiftini, men fólk vóru ógvuliga misjøvn á máli um viðurskiftini. Eitt av hesum málunum var, at Poul Nolsøe metti, at vit í Vestmanna Skúla vóru á skeivari leið, tí at vit høvdu ført fram, at vit t. d. kundu taka burtur av tímum í kristni, í føroyskum, í donskum og rokning, so at vit fáa tímajáttanina til Vestmanna Skúla at ganga upp. Hann segði, at vit áttu at prioritera lærugreinarnar. Hetta gav okkum høvi at biðja Poul Nolsøe koma við einum prioriteringslista, hvussu vit kundu prioritera tær ymisku lærugreinarnar í føroyska fólkaskúlanum. Tað skiltist tó, at hetta var Poul Nolsøe ikki sinnaður til. Tó gekk alt siðiliga fyri seg. Báðir partar komu til orðanna og fingu lýst støðuna, sæð frá hvør sínum sjónarhorni.

Kl. 12.00 kom Torbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri, inn í fundarhølið, heilsaði og settist. Hann spurdi, um tað vóru so nógv fólk í leiðsluni í Vestmanna Skúla. Hann fekk at vita, hvørji fólkini vóru. Og hann spurdi, um tað ikki var leiðslan í Vestmanna Skúla, sum var boðsend. Jú, so var. Og tá tað var týðuligt, at hann ikki ynskti, at álitisfólki var við á fundinum, fór hon av fundinum.

Løgfrøðingurin gav mentamálaráðharranum síðani ein samandrátt av tí,ið farið var fram á fundinum – Arbeitt og sprongt verður uttan fyri húsini, har Mentamálastýrið heldur til, so fundurin bleiv avbrotin eina løtu. Fundurin var tikin uppaftur inni á skrivstovuni hjá mentamálaráðharranum. – Torbjørn Jacobsen spurdi, hvussu vit kundu koma við hesum í einum valári, tí at hetta bert kundi fatast sum politisk provokatión. Augusta Egholm Petersen vísti á, at okkara arbeiði og partapolitikkur hevði onki við hvørt annað at gera. Skúlastjórin fyri Vestmanna Skúla legði fram hvørjar lógir og reglur, hann hevði at halda seg til. Og vísti til ein part av gongdini í málinum, soleiðis sum støðan hevur verið seinastu árini, og sum hon er í dag og útlitini fyri, at tímatalvan kann ganga upp við tí tímajáttan, Vestmanna Skúli hevur fingið. Janus Jensen greiddi fyri mentamálaráðharranum, soleiðis sum tímabýtið til Vestmanna Skúla hevur verið seinastu árini og hevði sett hetta upp í eina talvu. Poul Nolsøe helt, at um so er, at leiðslan í Vestmanna Skúla ikki kundi finna útav, hvussu vit kundu prioritera eins og hann hugsaði, so kundu vit í Vestmanna Skúla rokna við at verða sett undir administratión.

Mentamálaráðharrin tók síðani orðið og førdi ógvuliga harðliga fram, at leiðslan fyri Vestmanna Skúla átti at skilja, at tað var av størri týdningi, at børnini lærdu føroyskt ístaðin fyri, at skúlin setti dreingirnar at binda grýtulappar. Eyðsæð var, at hann tosaði av egnum royndum.

Kirsten Simonsen, sum er annar av varaskúlastjórunum, tók síðani orðið fyri at vísa á viðurskifti viðvíkjandi tíma- og lærugreinabýtinum, sum skúlarnir hava at halda seg til, men fekk ikki orðað seg lidnað, tí tá stóð mentamálaráðharrin uppi á gólvinum og bað hana sleppa sær á dyr, tí hon ikki kundi málbera seg nóg væl á føroyskum! - Sigast skal, at Kirsten Simonsen, ið er føroyskur tænastumaður í føroyska fólkaskúlanum, er av donskum uppruna, og hevur starvast í føroyska fólkaskúlanum síðan 1985.

Hesin atburðurin hjá Torbjørn Jacobsen, mentamálaráðharra, var leiðsluni í Vestmanna Skúla ovboðin, og fóru tey tí tá av fundi.

Mentamálaráðharrin fylgdi leiðsluni á dyr og uttar, meðan hann rópti aftanaá teimum, at leiðslan fyri Vestmanna Skúla var farin í politiskt valstríð fyri navngivnan tingmann í bygdini. Síðan endurtók hann, at tað var óhóskandi at koma fram við slíkum, sum skúlaleiðslan førdi fram í fjølmiðlunum í einum valári, og at hetta bert kundi fatast sum politisk provokatión. At enda bað hann skúlaleiðsluna fara oman á barrikadurnar í Kollafirði og føra valstríðið víðari við áðurnevnda tingmanni.

Vegna leiðslu Vestmanna Skúla

Jóannes Fonsdal,
skúlastjóri

Augusta E. Petersen,
varaskúlastjóri

Kirsten Simonsen,
varaskúlastjóri

Bólkaferð - Pensionistaferð

Enn eru nokur pláss eftir á Danmarkarferð saman við pensionistafelagnum av Tvøroyri við traðferð av Havnini fríggjamorgunin 08. juni. Koma eftur á Havnina mánamorgunin 18. juni

Í Danmark verður gist 7 dagar á hotell í Aalborg í dupultherrumum við WC/Bað. Hvønn dag verður skipað fyri útleiðum.

Kostnaður fyri hvørn fólk:
kr. 6.495,-
Bilegging á TlF. 345900

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

gult7 cyan7 magenta7 svart7

Leiðslan fyri skúlan á Giljanesi hættar sær ikki at noyða næmingarnar í 9. flokki til prótvtøku í ár, tí teir hava fingið ov lítið av undirvísing. Tískil hevur leiðslan heitt á Mentamálastýrið, um at ársmetini skulu galda sum prótvtøkumet. Mentamálastýrið hevur enn ikki svarað

Vilja sleppa undan prótvtøku í Vágum

Felagsskúlin á Giljanesi heitir í skrivi til Mentamálastýrið um, at ársmetini verða galdandi sum prótvtøkumet í framhaldsdeidini í ár. Skúlin hættar sær vegna vantandi undirvísing ikki at trýsta næmingarnar til prótvtøku

FÓLKASKÚLIN
John Johannessen

Stendur tað til skúlaleiðsluna á Giljanesi, verður eingin munnlig prótvtøka í skúlanum í ár.

»Av tí, at skúlalógin áleggur okkum lærarum at taka støðu í tí einstaka næminginum, kenna vit okkum ikki væl at trýsta næmingarnar upp til prótvtøku í ár«.

Soleiðis skriva skúlastjórin og lærararáðformaðurin fyri skúlan á Giljanesi í brævi dagfest 25. mai til fólkaskúladeildina í Mentamálastýrinum.

Ov lítil undirvísing

Leiðslan fyri skúlan vísir millum annað á, at 9. floks næmingarnir ikki hava havt vanliga undirvísing í vikuvís, orsakað av, at verkætlan, páskafrí starvsvenjing, skrivlig prótvtøka og at enda verkfallið fullu saman.

»Allir næmingar makta ikki setningin (pensum) uttan undirvísing í skúlanum, tískil vilja vit ikki seta teir í eina pínliga støðu til prótvtøkuna, og næmingarnir lata sær ikki slíkt lynda.«

Grundað á millum annað hetta mælir leiðslan til, at ársmet verða galdandi sum prótvtøkumet í framhaldsdeildini í ár, og at allur juni mánaður í staðin verður brúktur til undirvísing, so ársætlanirnar kunnu halda.

Provokera ikki

Emmy S. Joensen, skúlastjóri, sigur við Sosialin, at ætlanin við brævinum ikki er at provokera, men at vísa á, at tað stendur illa til í skúlanum orsakað av verkfallinum, og at myndugleikarnir mugu fyrihalda seg til hetta.

Brævið frá skúlanum á Giljanesi varð skrivað meðan ósemjan á arbeiðsmarknaðinum enn var óloyst. Men hóast tað nú aftur verður vaskað í skúlunum og næmingarnir tískil eru slopnir í skúla aftur, er tað sambært Emmy S. Joensen framvegis ein sannroynd, at næmingarnir í 9. flokki hava fingið ov lítla undirvísing til at fara til munnliga prótvtøku.

Einki svar er enn komið frá Mentamálastýrinum til leiðsluna fyri skúlan á Giljanesi. Tí hevur leiðslan broytt tímatalvuna, so næmingarnir í 9. flokki fáa intensivari skúlagongd enn vanligt. Hetta fyri at bøta eitt sindur um støðuna, um tað verður so, at næmingarnir verða noyddir at fara til munnliga prótvtøku um fáar dagar.

Frá P/F Skálabúðini
Nýtt frá Triumph heimkomið

Mintgrønt
Amourette 65 BH
388,-
Fæst frá stødd B75-C85

Tai trussur
218,-

String trussur
198,-

Lilla & Hvítt
Diva BH
318,-
Fæst frá stødd 75B-85DD

Eisini hava vit fingi nýtt í stórum støddum

Tai ella String trussur
166,-

Svart
Elasti Cross + Cotton Micro Bh
258,-
Fæst frá stødd C80-DD95

Fæst í bláum
538,-

Hvítt & Hildkarva
Smooth Shaper trussur
242,-

Prísur frá 268,-

Hjálpir tær við at halda formin uppá pláss

Nógv nýtt í náttklǫlum

Vælkomin inn á gólvið

Skálabúðin
Tlf. 315315